nánd
Heimatænastan

Deildarleiðari til Gøtubrá í Norðragøtu

Hevur tú leiðsluútbúgving og strategiskan førleika at leiða í samsvar við ásettu visjón hjá Nánd umframt útbúgving innan heilsu-, sjúkra- ella umsorganarfakliga økið? So gleða vit okkum at fáa eina umsókn frá tær.

Sum deildarleiðari hevur tú dagligu leiðsluna av deildini. Tú stendur við leiðsluni at kveikja og menna starvsfólkini, so tey kunnu stuðla undir tað, ið gevur hvørjum einstøkum húsfólki meining í lívinum, umframt at tú tryggjar nútíðar røkt og sjúkrarøkt. Tú verður partur av leiðslubólkinum hjá Nánd, ið javnan viðger felags mál og ætlanir. Tú verður eisini partur av visitatiónsnevndini hjá Nánd, ið møtir til fundar eina ferð um mánaðin til málsviðgerð av øllum tænastum hjá Nánd. Eisini verður tú partur av strategibólki og møguliga øðrum toymisbólkum við. Av fyrisitingarligum uppgávum eru m.a. at gera og umsita arbeiðsætlan, at fylgja tillutaðu fíggjarætlanini og at samskifta við samstarvspartnara.

Vit sóknast eftir einum deildarleiðara, sum:

- hevur hegni at seta í verk gjøgnumskygdar mannagongdir og at geva starvsfólkunum ábyrgd
- er ágrýtin og savnandi, hevur jaligan hugburð og sær møguleikar í arbeiðinum
- hevur jaligan hugburð til broytingar, hevur slagkraft og tolir at standa í truplum støðum
- hevur umsitingarligar førleikar og er væl skipað/-ur. Hevur munnligan og skrivligan málførleika umframt telduførleika á brúkarastøði

Tú mást brenna fyri at stuðla eldri fólkum. Tað er at:

- viðurkenna sjálvsavgerðarrætt hins einstaka og síggja týdningin av, at húsfólk hava ábyrgd av egnum lívi
- hava gott hjartalag og tolsemi at stuðla húsfólkunum og avvarðandi teirra
- stuðla undir, at húsfólk hava møguleika fyri at vera so sjálvbjargin sum gjørligt
- skipa ein virknan gerandisdag við eitt nú samveru, nærleika og rørslu

Setanarviðurskifti

Tann, sum sett/-ur verður, hevur tilvísing til leiðaran og tekur við starvinum tann 1. oktobur 2018 ella skjótast møguligt. Starvið verður at seta sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag. Umsókn saman við prógvum, tilvísingum o.ø. skulu sendast til: nand@eystur.fo og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. september 2018. Samrøður verða avgreiddar í viku 37 og 38 . Áhugað, ið hava okkurt at spyrja um, kunnu venda sær til Kristinu T. Larsen, leiðara, á telefon 730204 gerandisdagar millum kl. 10 og 16.

Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna hava skipað javnbjóðis samstarv, og dagliga umsitingin hjá Nánd er partur av umsitingini hjá Eysturkommunu. Samstarvið rekur trý heim, eitt dagtilhald fyri fólk við demenssjúku og eina deild, ið tekur sær av heima- og sjúkrarøkt og endurvenjing. Samstarvið hevur tilsamans 54 ársverk, av hesum telur Gøtubrá á leið 17 ársverk. Á Gøtubrá búgva 16 búfólk, her ímillum eru 6 á demensdeild. Sí meira um Nánd, missión, visjón og virði á www.eystur.fo